## Eingin Gerrard ímóti Týsklandi

Miðvallarspælarin Steven Gerrard verður ikki við á enska landsliðnum, sum mikukvøldið spælir venjingardyst ímóti Týsklandi. Gerrard fekk skaða í dystinum hjá Liverpool ímóti Bolton leygardagin, og hann hevur givið avboð til landsliðið. Roknað verður við, at Steven Gerrard má binda frið í einar 10 dagar, áðrenn hann kann spæla aftur.



## Føroyar favorittar

Føroysku telvararnir á talvolympiaduni í Dresden í Týsklandi fegnaðust í gjárkvøldið um úrslitið móti Hollandi. Men tað er ikki tíð til at hvíla. Í dag er aftur landsdystur, og nú eru føroyingarnir farnir at fyrireika seg til eina nýggja avbjóðing. Hon verður ivaleysa stór, hóast mótstøðuliðið á pappírinum ikki hevur somu styrki sum Armenia og Holland, ið Føroyar hava telvað ímóti í vikuskiftinum. Á heimasíðuni faroechess.com verður tikið soleiðis til: Eftir sensationelt góða úrslitið í dag ímóti Hollandi, møta Føroyar í 5. umfari Bolivia - ein mótstøðutjóð, har vit á pappírinum skuldu havt rímiliga góðar møguleikar fyri einum munadyggum úrsliti.

## Hondbóltsútisetarnir á odda

**Bæði kvinnurnar og harrarnir liggja fremst í sínari deild eftir sigrar í gjár**

HONDBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Mennirnir vóru á vitjan hjá CBS og vunnu 20-16 eftir hálvleiksstøðuna 8-10.

Í fyrra hálvleiki skiftust liðini at gera mál, tó at ÍF Føroyar dróg nakað frá í endanum, og fór til hálvleiks við einari leiðslu á 8-10. CBS byrjaði væl í øðrum hálvleiki, men við góðum spæli inn til strikuna og Rana Slættanes, eydnaðist tað føroyingum at varðveita lítla málmunin.

Móti endanum settu ÍF Føroyar ein minni spurt inn, so støðan eina løtu var 20-13, men tað eydnaðist CBS at fáa trý mál aftrat áðrenn dysturin var av.

Føroysku málskjúttarnir vóru Rani Slættanes 5, Heini Ellingsgaard 3, Heini Bendtsen 3, Ári Rouch 3, Róar Akralið 2, Hjalti Jacobsen 2, Helgi Justinussen 1 og Steingrím B. Funding 1.

Menninir eru nú á odda í deildini við tveimum stigum framanfyri FIF og Team Nørrebro, sum tó hava spælt ein dyst minni enn føroyingarnir.

Kvinnurnar vóru ósigraðar undan dystinum í gjár, og tað eru tær framvegis hóast toppdystur var á skránni. Mótstøðuliðið var PI, sum føroysku kvinnurnar vunnu 21-19 á, eftir javnleik 8-8 í steðginum.

Nakað inn í seinna hálvleiki var støðan 11-11, og tástaðni kom glið á føroyska spælið. Kvinnurnar komu á odda 18-13 og so var sigurin ongantíð í vanda, hóast PI kom afturí aftur og fekk minka um málmunin.

Føroysku kvinnurnar hava fult stigatal eftir fimm dystum, meðan Ajax á øðrum plássi hevur seks stig.

# Talv sett Føroyar á heimskortið

**Føroyska talvlandsliðið er í hesum døgum í eysturtýska býnum Dresden, har OL-talv verður telvað. Og sigast má, at telvarar okkara veruliga hava bitið frá sær ímóti øllum teimum stóru tjóðunum**

TALV
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*



*Helgi Dam Ziska, sum her sæst undir liðini á Heina Olsen, framdi eitt satt bragd, tá hann í gjár vann á hollendskum stórmeistara*

*Mynd: www.faroechess.com*



*Helgi Dam Ziska*

Føroyska landsliðið er við talv-OL í Dresden styrkismett sum nr. 73 av teimum í alt 154 luttakandi. Á føroyska liðnum eru Jóan Hendrik Andreasen, Martin Poulsen, John Rødgaard, Helgi Dam Ziska og Heini Olsen.

### Favorittar

Í fyrsta umfarinum, sum varð telvað hósdagin, var føroyska landsliðið favorittur at vinna á Sri Lanka, sum er styrkismett 41 pláss lægri enn okkara. Og sigast má, at Føroyar livdu upp til vónirnar, sum á pappírinum settar vóru. Føroyar vunnu dystin trygt 3-1, har Martin Poulsen, John Rødgaard og Heini Olsen allir vunnu síni talv, meðan Jóan Hendrik Andreasen sum einasti føroyingur tapti sítt talv.

### Knógvaðu pakistanum

Leygardagin var 2. umfar á skránni, og tá bíðaði Pakistan, sum er styrkismett 66 pláss lægri enn Føroyar. Hetta gjørdist ein væl javnari dystur enn tann ímóti Sri Lanka, og endaði hann við, at Føroyar vunnu 2½-1½. Heini Olsen vísti sannførandi talv og vann trygt á Amir Karim. Á borði 2 var John Rødgaard favorittur at vinna á Waqar Mohamed, men danski føroyingurin endaði við at tapa talvið. Við sigri á Butt Khalil Ur Rehman beindi Martin Poulsen føroyingar aftur á rætta kós, og við javnleiki í sínum talvi tryggjaði Jóan Hendrik Andreasen næsta sigurin av eins nógvum møguligum. Ein strálandi byrjan, men nú bíðaðu væl størri uppgávur.

### OL-vinnarar

Í triðja umfari bíðaði eingin minni enn Armenia, sum er verandi OL-vinnari. Talvsamband Føroya sammetti henda dyst við Føroyar og Brasilia í fótbólti, og greitt var undan talvinum, at hetta var ein nærmast ómøgulig uppgáva. Tó hevði Føroyar nú fingið styrkt seg við Helga Dam Ziska, sum undir dystinum í 2. umfari var ávegis úr Føroyum til Dresden.

Tað bleiv tó ikki til nakað stig ímóti armensku kempunum. Allir teir fýra armensku stórmeistararnir knógvaðu okkara sakleysu monnum, men vit frætta, at hevði hepnið verið eitt lítið sindur meiri við okkum, hevði talan blivið um okkurt stig til Føroyar.

Hóast tapið, tóku telvararnir dystin ímóti OL-vinnarunum sum eina stóra uppliving.

### Helgi feldi stórmeistara

Í gjár var mótstøðuliðið Holland, sum eisini var fongt við stórmeistarum. Alt uttan 4-0 tap ímóti Hollandi var at rokna sum sigur fyri Føroyar, skrivaði talvsambandið undan dystin, og eftir hesum at døma fekk føroyska landsliðnum ein flottan sigur – hóast Holland vann dystin. Eftir tap í fyrsta dystinum hevði Jóan Hendrik Andreasen av álvara reist seg aftur, og aftur í hesum dystinum megnaði hann at vinna eitt hálvt stig, tá ið hann telvaði javnt ímóti Jan Werle. Her kann sigast, at Jan Werle hevði eitt styrkistal áljóðandi 2582, meðan Jóan Hendrik Andreasen 'bara' hevði 2179.

18 ára gamli Helgi Dam Ziska er hægst styrkismetti føroyingurin, og hann framdi eitt satt bragd við at vinna á hollendska stórmeistaranum, Wely van Loek. Við hesum tapti Føroyar dystin ímóti Hollandi 1½-2½.

## Kuhn ávarar sínar menn



Tað hevur gingið munandi betur hjá donsku meistarunum AaB, síðani felagið segði venjaran Bruce Rioch úr starvi. Hjálparvenjarin Allan Kuhn hevur nú fyribils ábyrgdina av liðnum, og hann hevur ikki tapt í superliuni í fýra dystum. - Tað hevur gingið væl hjá okkum seinastu dystirnar, men nú mugu vit ikki blíva ov glaðir fyri tað, um vit hava vunnið ein dyst. Vit skulu halda fram at arbeiða hart, sigur Allan Kuhn.

## Aftur stig til Frem

Jón Rói Jacobsen og Atli Danielsen spældu báðir allar 90 minuttirnar, tá teir og liðfelagarnir ognaðu sær eitt stig í einum málleysum javnleiki á heimavølli á Valby Idrætspark ímóti Herfølge. Heimasíðan hjá Frem metir, at Frem varð tað betra liðið sæð yvir allan dystin, serliga í 1. hálvleiki. Men fremmarnir lata ikki illa at. Teir eru ósigraðir í sjey dystum nú. Frem liggur á einum 8. plássi í næstbestu donsku fótbóltsdeildini við 18 stigum fyri 14 dystir. Teir hava 5 stig niður til niðurflytingarstrikuna, og 11 stig upp til uppflytingarstrikuna. Seinasti dysturin hjá Frem í 2008, verður á útivølli ímóti Viborg, sum liggur á 2. plássi í deildini við 29 stigum.